

*Vilhelm Johannesen heldur, at Aksel er eitt gott boð upp á ein komandi formann í Javnaðarflokkinum*

*Mynd: Beinta Haraldsen*

# Sum faðir so sonur

**Á heysti í 1979 bleiv Vilhelm Johannesen tilnevndur landsstýrismaður í millum annað heilsumálum, og nú 30 ár seinni hevur sonurin Aksel sett seg í sama stól. Og sambært pápanum er sonurin eitt gott boð upp á formansstarvið í Javnaðarflokkinum**

## Politikkur

**Jan Müller/Árni Joensen**
jan@sosialurin.fo
arni@ras2.fo

Vilhelm Johannesen tók seg burtur úr politikki fyri nøkrum árum síðani, men áhugin er tann sami, og hann dylur heldur ikki fyri, at hann er sera fegin um, at tann yngsti sonurin hevur valt at ganga somu leið sum hann sjálvur - ikki minst flokspolitiskt.

- Ja, eg eri fegin um, at hann er javnaðarmaður. Men mær er sagt, at Aksel skal hava sagt, at hann er ikki javnaðarmaðurin, tí at pápin er tað, men av egnari sannføring. Tað haldi eg er gott, og sjálvandi er tað ikki verri, at hansara sannføring er tann sama sum hjá pápanum, sigur Vilhelm Johannesen við Rás2.

- Men hvat er tað fyri kvalifikasjónir, sum kunnu gera hann til ein góðan landsstýrismann?

- At hann líkist pápa sínum, er tað skjóta svarið frá tí garvaða og skemtingarsama pápanum. Tað er kanska ikki allur sannleikin, men Vilhelm heldur, at Aksel hevur nakrar eginleikar, sum eru sera hentir at hava í tí politiska pallinum.

- Hann setir seg væl inn í tey mál, sum hann viðger, hann dugir nokk so væl at tosa, og hann dugir væl at argumentera fyri sínum sjónarmiðum. Harafturat hevur hann lætt við at hava við onnur fólk at gera, og tað er sera týdningarmikið í hesum arbeiðinum. Kann tú ikki fáa undirtøku millum fólk, kanst tú ikki reka politikk, sigur Vilhelm Johannesen.

### Samskiftið umráðandi

Sum tann royndi politikarin hann er, hevur Vilhelm Johannesen sjálvandi onkur góð ráð at geva Akseli. Eitt nú heldur hann tað vera umráðandi, at ein sum nýggjur landsstýrismaður fer at vitja teir stovnarnar, sum hoyra til málsøkið, eitt nú sjúkrahúsini. Tað gjørdi Velhelm sjálvur, tá hann kom í landsstýrið.

Hann fór fyrst at vitja Suðuroyar Sjúkrahús. Tá var eitt stýri fyri hvørt sjúkrahús, og landsstýrismaðurin kundi taka lut á fundum hjá stýrunum. Tað gjørdi Vilhelm Johannesen á Tvøroyri, og tá hann seinni fór til Klaksvíkar og á Landssjúkrahúsið. Samskiftið millum landsstýrismannin og stovnarnar hevur stóran týdning, heldur hann, og hann mælir soninum til at ganga somu leið.

- Ja, eg haldi, at hann skal royna at hava gott samskifti við stovnarnar og serliga stovnsleiðslurnar, og so skal hann eisini vísa seg har viðhvørt. Tað gevur virðing fyri starvinum sum landsstýrismaður, at ein stundum fer at vitja, og tað vil eg mæla Akseli til at gera, sigur Vilhelm Johannesen við Rás2. Men kann Aksel ein dag gerast formaður í Javnaðarflokkinum?

- Ja, hann er í hvussu er eitt gott boð, svarar pápin avgjørdur - og hesaferð fylgir eingin látur við.

### Halda kósina

Síðani Rás2 gjørdi prátið við feðgarnar Vilhelm og Aksel, hevur ein veljarakanning givið Javnaðarflokkinum ein dyggan frammaná. Hetta er ikki tað fyrsta bakkastið hjá flokkinum, og Johannesen-feðgarnir eru á einum máli um, at flokkurin eigur at miðsavna seg um nøkur heilt fá mál og at halda fast um síni sjónarmið á teimum økjunum.

- Upp undir valið í 1958 fekk Petur Mohr Dam tey ráð at tosa og skriva um fólkapensjónina og einki annað, tí fólk vistu, hvat tað var og kundu tí taka støðu. Tað riggaði so væl, at flokkurin fekk eitt sera gott val og fór úr trimum upp í átta tinglimir, sigur Vilhelm Johannesen. Sonurin hevur nakað somu hugsan.

- Tað politiska landslagið hevur ofta verið so, at Javnaðarflokkurin hevur verið noyddur til at ganga við til neyðsemjur við sínum egnu hjartamálum fyri at sleppa í samgongu, og tað hevur kostað flokkinum dýrt, sigur Aksel V. Johannesen.

Sosialurin